# VEÐRIÐ Í SKÚVOY



## JANUAR 2024

## VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Skúvoy ..... 3
Veðrið í bygdini ..... 4
- Norðan ..... 6
- Landnyrðingur norðan ..... 6
- Landnyrðingur ..... 7
- Landnyrðingur eystan ..... 8
- Eystan ..... 8
- Landsynningur eystan ..... 8
- Landsynningur ..... 9
- Landsynningur sunnan ..... 9
- Sunnan ..... 10
- Útsynningur sunnan ..... 11
- Útsynningur ..... 11
- Útsynningur vestan ..... 12
- Vestan ..... 13
- Útnyrðingur vestan ..... 14
- Útnyrðingur ..... 14
- Útnyrðingur norðan ..... 15

**Dagfesting**: 10. januar 2024

**Staður**: Skúlin í Skúgvi, á Skúlavegi 6 – 260 Viðareiði

**Heimildarfólk:** Tummas Frank Joensen, Meinard Hentze, Harry Jensen & Josef Grettursson

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Skúvoy

Skúvoy er einasta bygdin á oyggj við sama navni – sunnan fyri Sandoy og norðan fyri Stóru Dímun.

Kring oynna er hav – næsta oyggj er Sandoy, 4 km eystanfyri og 6 km norðanfyri.

Bygdin er miðskeiðis á eystursíðuni á oynni. Úr bygdini og vestureftir er oyggin hægri. Hægsta fjallið er Knútur (392m). Vestari partur av oynni er javnt høgur.




Mynd 1: Kort av Skúvoy.

## Veðrið í bygdini

Veðrið í Skúgvi er tengt at ættini, sum tað er í øllum øðrum bygdum í Føroyum.

Sveiggini ímillum gott og ringt veður kunnu vera stór, og bert lítil munur í ættini ger mun í veðrinum í bygdini. Er liggjandi góðveður av norði í nakrar dagar, kann vera sera turt og gott veður við klárum lofti. Liggur hann av útsynningi, er vanliga nógvur vindur við hørðum hvirlum.

Alt meðan veðrið aðrastaðni í Føroyum kann vera munandi øðrvísi.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Skúgvi, setti undirritaði seg í samband við fýra skúvoyingar: Tummas Frank Joensen (**TFJ**), Meinhard Hentze (**MH**), Harry Jensen (**HJ**) & Josef Grettursson (**JG**). Teir hava búð í Skúgvi meginpartin av lívinum og hava tikið lut í dagliga: seyðhaldi, í bjørgum og bakka og á útróðri.

Við til samrøðuna í skúlanum í Skúgvi hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Tá ið ættin er norðan, kemur vindurin av bygdini heima á Sandi beint til Skúvoyar.



Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu javnur vindurin er í bygdini, tá ið hann kemur av norði. Er nógvur vindur, er nógvur vindur norðast í bygdini og  sunnan fyri Áldarsbakka, meðan tað merkist lítið til vind mitt í bygdini.

Úti á fjørðinum kann vera nógvur vindur, men hann kemur ikki inn til bygdina. Brim á norðurætt rakar ikki bygdina.

Norðan er ein góð ætt í Skúvoy. Vindferðin er tann sama sum fyri landið. Í illveðri er hon ikki skaðaætt.

Norðan er ikki ein vát ætt, ælingarnir fara fram við Sandoynni suðureftir. Tað er ikki mjørki á norðurætt.

## Landnyrðingur norðan

Veðrið á landnyrðingi norði líkist veðrinum á landnyrðingi.

## Landnyrðingur

Tá ið hann kemur av landnyrðingi, rakar lotið oynna sunnan fyri Skarvatanga, verður lyft slakar 100 metrar, áðrenn tað kemur til bygdina. Tá ið landnyrðingurin kom, vóru sum byrsuskot at hoyra inni undir landi á Sandoynni.



*Mynd 3: Ímóti landnyrðingi*

Tá ið hann liggur av landnyrðingi, er ikki brim, men tað rullar illa við kajuna. Tað kann vera trupult at sleppa at lendingini. Í nógvum vindi fær Sildberin ikki lagt at fyri bakslátri. Gamli Sildberin var betri í ringum líkindum.

Er skadduvindur av Sandoynni, strekkir hann út ímóti hálvum fjørðinum og ger vindvág undan sær í sjónum út fyri bygdini.

Tað kann vera stormur hjá postbátinum á Sandi, men stilli út í Skúgvi – serliga á eystfallinum.

Vindurin er javnur í bygdini, men kann tó vera ymiskt, hvussu tað er í bygdini, tá ið tað er nógvur vindur. Tey norðastu húsini merkja væl vindin, og eisini sunnan fyri Áldarsbakka. Mitt í bygdini merkja tey ikki nógv til vind av landnyrðingi.

Í bygdini er nakað tað sama av vindi, sum tað er í miðal fyri landið, men inni á fjørðinum kann vera munandi meiri vindur.

Á landnyrðingi kann vera vátt, men tað kann eisini vera góður hoyterri á ættini. Ælingarnir kunna standa inni við Sandoynna, men koma ikki út.

Landnyrðingur er ikki mjørkaætt.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á landnyrðingi

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, kemur lotið av Sandoynni og beint inn ímóti bygdini.



*Mynd 4: Ímóti eystri*

Á eysturætt er vindurin javnur og kaldur. Kuldin fer um hvørt húsahjørn og kølir alla bygdina. Tað lívir ongastaðni, men kuldin fer í hvørt skot.

Tað er ikki meira vindur í ættini, enn tað er kring landið, men nakað tað sama.

Eysturættin er ikki vát ella mjørkaætt. Mjørkin sæst viðhvørt koma upp um Sandoynna í Djúpadali (*Húsvísksdali*) úr Dali, men røkkur ikki oman á sjógv.

Ættin kann bæði vera góð og ring. Hon er góð á fjørðinum, tá ið eystfalsstrongurin er uppi, í einar 3-4 tímar. Tá ið strongurin linkar, er alda aftur.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist eysturættini – hann er fastur á Flesini (*í Dalsendanum*)

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur lotið beint úr fjørðinum til bygdina.



*Mynd 5: Myndin tikin móti landsynningi. Lotið er leyst av Dalsendanum og kemur beint úr fjørðinum til bygdina.*

Landsynningur ein útroknilig ætt. Bygdarfólkið veit, hvat tey kunnu rokna við.

Ættin er jøvn, ikki skaðaætt í Skúvoy. Vindurin er javnur, kemur norður ígjøgnum fjørðin. Ættin er viðhvørt trá – kann liggja leingi.

Vindferðin á landsynningi er í Skúvoy tann sama sum fyri landið og kann vera vát. Um summarið, tá ið tað er næstan stilli – tá ið hann bara andar – kann mjørkin fylla allan fjørðin.

Landsynningur er brimætt burturav og er lættur at lesa av.

## Landsynningur sunnan

Veðrið á landsynningi suðuri líkist veðrinum á landsynningi, men er tó eitt sindur frægari. Tá ið hann kemur lágt, sjóðar fram við landi, og dunnurnar fara at gvagga.



*Mynd 6: Skúvoyarbygd ímóti landsynningi suðuri.*

## Sunnan

Tá ið ættin er sunnan, kemur lotið ímóti oynni suðuri í bergi, fer uppum og síðan eftir oynni norðureftir og oman ímóti bygdini



*Mynd 7: Ímóti suðuri*

Á suðuri er vindurin javnur. Í bygdini er sami vindur sum í landinum, tó kann nógvur vindur vera niðast í bygdini. Suðurættin kann uppføra seg ymiskt. Er hann á veg ímóti útsynningi, kann tað verða skaðaætt. Liggjandi suðurætt er ikki skaðaætt.

Suðurættin er kyrruætt. Tað flagar norður við landinum, ongan glæður eru, men myrk skýggj eru, sum fara eftir sjónum. Er nakað av vindi, kann sunnan fyri tangan. Er nógvur vindur, kann allur fjørðurin glæða.

Ættin kann vera vát. Ofta er ælaveður á suðuri, men tað heldur ikki.

Sunnan er mjørkaætt, líkasum tað er við landsynningi.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan kann vera ring niðri í bygdini – skaðaætt í ringum veðri. Í aðrar mátar er ættin sum á útsynningi.

## Útsynningur

Tá ið hann kemur av útsynningi, rakar vindurin oynna millum Bustartanga og Tórarenni. Hetta er steyrrætt berg, eggin er umleið 380 metrar oman fyri sjóvarmálan.

Luftin verður lyft uppum og kemur omaneftir ímóti bygdini.

Tað er ongantíð stuttligt, tá ið sagt verður frá stormi av útsynningi.



*Mynd 8: Myndin tikin av bygdini í útsynning.*

Útsynningur er ringasta ættin í bygdini til vind.

Er nógvur vindur av útsynningi, er hann ójavnur, tá ið hann kemur oman úr haganum. Í bygdini er hann óútrokniligur og kann koma allastaðni frá. Hvirlurnrar eru meiri enn tvær ferðir so harðar sum miðalvindurin. Í løtunum millum hvirlurnar kann vera stilli, tað ber til at bresta ein svávulpinn millum hús í bygdini.

Hvirlurnar sum koma omaneftir, sláa bakk og fara niðaneftir inn í Dal.

Í góðum veðri er útsynningur góð ætt. Tað er kyrt við lendingina og eisini góð lundaætt.

Útsynningur er ikki ein vát ætt í Skúvoy, mest ælaveður, og um summarið kann vera mjørki.

## Útsynningur vestan

Veðrið á útsynningi vestri líkist veðrinum á útsynningi – serliga tá ið tað kemur til vind.



*Mynd 9: Ímóti útsynningi vestri.*

## Vestan

Tá ið hann kemur av vestri, kemur lotið inn ímóti berginum vestanfyri og verður lyft uppum einar 300 metrar. Haðani fer lotið eystureftir og oman ímóti bygdini.



*Mynd 10: Ímóti vestri*

Tá ið ættin er vestan fyri útsynning, er vindurin javnur. Tað kann vera meiri vindur í ættini oman ígjøgnum bygdina.

Í frískum vindi á vesturætt, er vindur ójavnur, og fer tyrlan út á fjørðin, fyri at fáa javnan vind, tá ið hon skal suðureftir.

Ættin er ikki vát, mest ælaveður. Vanliga er ikki mjørki á vestri, men tað kann henda.

Vesturættin verður ikki róst nakað serligt av skúvingum. Er nógvur vindur vestaneftir, kann alda koma heim ígjøgnum fjørðin – t.e. suðureftir. Ættin er lumpin, tí tað sæst einki til hana, fyrr enn fyllingar koma upp á land á lendingini.

## Útnyrðingur vestan

Harðastu hvirlur í ódnarveðri norðast í bygdini eru, tá ið nógvur vindur er av útnyrðingi vestri. Annars er veðrið sum á vesturætt.

## Útnyrðingur

Tá ið hann kemur av útnyrðingi, rakar lotið oynna millum Íslingatanga og Høvdan. Luftin verður lyft upp um eggina – einar 200 metrar og fer oman ímóti bygdini.



*Mynd 11: Ímóti útnyrðingi*

Á útnyrðingi er vindur í bygdini javnur. Vindurin merkist ikki væl.

Í ælaveðri fara ælingarnir eystur ígjøgnum Húsavíksdal.

Ættin er ikki vát, men tað kann vera lumpið ælaveður. Ein góðan summardag kann vera góður hoyterri, bláur himmal, einki skýggj. Men so kann ælið brádliga vera har og oyðileggja hoyggingina tann dagin.

Tá ið hann er útnyrðingur, er ikki mjørki.

Ættin er brimætt burturav, tó tað lívir væl í bygdini. Skúvingar frykta mest fyri bátum á fjørðinum í útnyrðingi.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum á norði